# Væl nøgdir grønlendingar

**Grønlendska ferðalagið, sum í farnu viku kunnaði seg um føroysk viðurskifti, fekk hópin av hugskot og góðan íblástur á ferðini, skrivar Vinnuhúsið á heimasíðu síni**

VITJAN
*www.industry.fo*

- Vit kunnu læra nógv av føroyskum loysnum. Hetta var niðurstøðan hjá flestu av grønlendsku gestunum, sigur Ole Rud, stjóri í Grønlendska Arbeiðsgevarafelagnum.

Teir hildu at partar av føroysku umsitingini eru minni og effektivari enn í Grønlandi. Til dømis var nógv spurt um føroysku skattaskipanina og einføldu loysnirnar hon byggir á. Útbúgvingarverki og høga føroyska útbúgvingarstøði var nógv umrøtt. Føroyska Arbeiðsloysisiskipanin vakti eisini áhuga.

Á vinnuliga økinum hildu teir at Føroyar var komið fitt ávegis seinnu árini, og somuleiðis tá tað kemur til infrastruktur.

Í kjakinum millum gestirnar og føroysku luttakararnar var staðfest, at vit hava somu trupulleikar á ávísum økjum, t.d. stóra almenna ognarlutin í vinnulívinum og í at fáa eina effektiva kapping á einum lítlum marknaði.

Tað var Arbeiðsgevarafelagið í Grønlandi sum skipaði fyri vitjanini í farnu viku og 40 vinnulívsfólk, politikarar og embætisfólk luttóku.

Endamáli við ferðini var at kunna seg um føroyar, hvussu vit hava skipað samfelagið, umsiting og vinnuviðurskiftir. Vinnuhúsið hevði lagt dagarnar í Føroyum til rættis. Talan var bæði um fyrilestrar, tjak og virkisvitjanir.

# Heiðra tónaskaldið Højgaard

**Á Toftum verður í hesum døgum gjørt nógv burtur úr, at 100 ár eru síðani tónaskaldið og kórleiðarin Hans Jacob Højgaard sáli varð borin í heim í bygdini**

TÍÐINDASKRIV

Nú leygarkvøldið 28. august kl. 20 verður ein almenn kvøldseta, har tónaskaldið og kórleiðarin verður lýstur á ein lættan hátt. M.a. fara næstrafólk hjá Højgaard og fólk, ið hava sungið hjá honum, at greiða frá og nógvur felagssangur verður eisini á skránni. Lítið man vera at ivast í, at við nógvum kórsangarum í høllini verður trivið í onkran fleirræddaðan kórsang.

Hans J. Højgaard var lærari í heimbygdini frá 1929 til 1953 og hesi árini var ein stórur partur av fólkinum í bygdini við í barna-, gentu- og vaksnamannakóri hjá honum, har hann slapp at royna nógv av teimum nýggju løgunum hann hevði gjørt. Í 1953 fór Højgaard til Havnar at vera lærari, men hann hevði øll árini til hann andaðist í 1992 nógv samband við heimbygdina og tók upp LP-plátur við Toftakórunum.

Ymisk onnur tiltøk eru á Toftum í sambandi við 100 ára haldið. Næstseinasta sunnudag høvdu Kórið í Fríðrikskirkjuni og Havnarkórið heiðurskonsert. Leygarkvøldið 4. september kl. 20 fer Ólavur Hátún at halda fyrilestur um tónaskaldið av Toftum í kjallaranum í Fríðrikskirkjuni og sama dag letur ein framsýning upp um tónaskaldið, kórleiðaran og læraran Hans Jacob Højgaard.

Sjálvan 100 ára dagin 11. september verður sangløta í Fríðrikskirkjuni kl. 18, har Kirkjukórið, eitt veterankór og eitt barnakór við Mikael Johan Heinesen sum leiðara fara at syngja. Sama dag kemur ein fløga út við løgum hjá Hans Jacob Højgaard. Blandað kór, barnakór og gentukór av Toftum syngja og tónaskaldið sjálvt stjónar fleiri av sangunum á fløguni. Flestu av upptøkunum hava ikki verið givnar út áður.





# Javnstøðudagur skal fyriskipast

**Kvinnupolitiska seminarið, sum varð hildið á Hotel Føroyum í vikuni, førdi við sær eina ítøkiliga niðurstøðu við tí endamáli at betra um javnstøðuna millum kynini**

JAVNSTØÐA
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Niðurstøðan hjá kvinnunum er í fimm pørtum: Fýra tilmæli og ein staðfesting. Í fyrstu atløgu verður mælt til at skipa fyri einum javnstøðudegi í vesturnorði.

Kvinnupolitiska seminarið mælir eisini politisku flokkunum til at orða ein javnstøðupolitikk, sum skal standa í stevnuskránni hjá flokkunum.

Harumframt varð tilmælt at tillaga arbeiðsumstøðurnar í teimum vesturnorðisku parlamentunum við serligum atliti til familjulívið.

Í fjórða lagi staðfestir kvinnupolitiska seminarið, at kvinnur er líka væl egnaðar at luttaka í politikki og at taka politiskar støður, eisini sum ministarar. Í sama viðfangi verður mælt til, at londini gangnýta alt teirra tilfeingi, soleiðis at helvtin av tí politiska potentialinum ikki fer til spillis.

Endiliga verður mælt til, at ein kanning verður gjørd um samfelagið, og hvussu hetta sær upp á kvinnuliga luttakan í politikki.

# Kostar onki at ringja

Danska fyritøkan Telsome ætlar at bjóða føroyingum bíligari telefonsamband gjøgnum sokallað IP-telefoni. Fyritøkan sigur í tíðindaskrivi, at ein telefonsamrøða til eitt nú USA kostar 25 oyru um minuttin. Hjá Føroya Tele er hesin kostnaðurin 4,10 oyru um minuttin.

At ringja til Danmarkar kemur at kosta 10 oyru um minuttin, og minuttprísurin til hini norðanlondini verður um 25 oyru.

-Vit hava valt at leggja út við IP-telefoni í Føroyum, tí vit halda, at tað er eitt neyðugt tiltak á føroyska marknaðinum, sum er merktur av einkarsølu. Og ikki minst tí vit sjálvsagt duga at síggja, at føroyingar kunnu spara nógvan pening við at verða kundi hjá Telsome. Ikki minst tí Telsome-kundar kunnu tosa fyri null krónur sínamillum - sjálvt um tað er uttanlanda, sigur stjórin i Telsome, Tim Chawes.

Meri fæst at vita við at ringja +45 4690 4000.

*-hkm*

## Føroyskt er væl umtókt

Nú er ein mánaður liðin, síðani Televarpið byrjaði at spæla føroyskan tónleik á Rás1, og einki er at ivast í, at fólk eru sera væl nøgd um hesa tænastuna.

Laila Hentze, stjóri á Televarpinum, sigur, at tey hava fingið nógvan respons frá fólki, sum eru fegin um hesa tænastuna, og sjálv er hon eisini fegin um, at Televarpið hevur valt hetta modellið.

- Vit hava jú sera nógvan og góðan føroyskan tónleik, og samstundis er talan alla tíðina um stóra variatión. Á ein hátt undirstrikar hetta kanska eisini, at talan hjá okkum er um eina føroyska loysn, sigur hon.

Eisini verður víst, at teir pengar, sum Televarpið rindar í KODA-gjaldi, á hendan hátt í størst møguligan mun koma føroyskum tónleiki til góðar.

Umframt tónleikin, inniheldur Rás1 í løtuni tíðindi frá Sosialinum, hús á sølulistanum hjá Sp/f Inni, veðurtíðindi frá Landsverki og valuta frá Føroya Banka.

At enda sigur stjórin, at tey framhaldandi miðja eftir at menna innihaldsliga partin av Rás1, og er ætlanin, at talan í framtíðini millum annað eisini verður um føroyskt framleitt sjónvarpstilfar umframt sjónvarpslýsingar.

*-jm*



# Einligu mammurnar ongan góðan

**Landsstýrismaðurin í almannamálum, Hans Pauli Strøm, kann ikki lova einligum mammum betri kor í bræði. Hann sigur kortini vilja virka fyri, at bústaðartrygging og sonevndi barnakekkurin verður settur í verk**

EINLIGAR MAMMUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Betri kor hjá børnum og barnafamiljum. Bíligari mjólk og skúlamat. Tað treyt ikki við góðum vallyftum til føroysku familjurnar í valskrá Javnaðarfloksins undan løgtingsvalinum í ár.

Í vikuni kunngjørdi Sosialurin eina kanning av støðuni hjá einligum mammum í Havn, og talan er um alt annað enn eina sólskinssøgu.

Einligu mammurnar vóru so illa sperdar, at tær høvdu ongan pening til at rinda sjónvarp- og útvarpsgjald. Fleiri teirra vóru noyddar at útseta rokningar fyri at hava pening til føðingardagar og konfirmasjónir. Einligu mammurnar kendu seg í fleiri førum noyddar at yvirdraga kontuna hvønn mánað, tí tær fingu ikki endarnar at røkka saman. Síðan februar mánað hevur Javnaðarflokkurin umsitið almannaøkið, og vit hava tí spurt landsstýrismannin, Hans Paula Strøm, um hvørji átøk, hann ætlar at gera fyri einligu mammunum í Føroyum.



*Hans Pauli Strøm kann ikki lova einligu mammunum betri kor, tí í løtuni er ikki fíggjarorka til tað*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Skipanir vanta

Landsstýrismaðurin í almannamálum dylir ikki fyri, at fremsta orsøkin til, at føroysku mammurnar hava tað torførari enn einligu mammurnar í okkara grannalondum er, at føroyska almannaverkið ikki kann bjóða somu endurgjaldsskipanir sum eitt nú danska almannaverkið.

Hans Pauli Strøm vísir á, at føroyska forsorgarveitingin stendur fult í mát við veitingarnar í øðrum Norðanlondum, men trupulleikin hjá einligu mammunum eru høgu útreiðslurnar.

– Ein høvuðstrupulleiki er eisini, at vit løtuni ikki hava nakrar sonevndar endurgjaldsskipanir, sum øll okkara grannalond hava. Her hugsi eg um bústaðartrygging (boligsikring, blðm), familjuveitingar (barnakekk, blðm) og systkinafrádrátt, sigur landsstýrismaðurin í almannamálum.

Hann greiðir frá, at bústaðartryggingin er ein frálík skipan, men hon er nyttuleys í Føroyum í løtuni.

– Í løtuni er bústaðarmarknaðurin í Føroyum fullkomiliga óskipaður. Vit arbeiða í løtuni bæði við at útvega fleiri bústaðarmøguleikar og nýggjari skattalóg fyri útleigan, sum skal linka trýstið á bústaðarmarknaðinum. Áðrenn hetta arbeiðið er liðugt, ber ikki til at seta eina bústaðartrygging í verk, tí so endar allur peningurin í lummunum á útleigaranum, og tað er ikki júst endamálið, sigur Hans Pauli Strøm.

### Í aðru røð

Tað er einki dulsmál, at skipanir sum bústaðartrygging, familjuveitingar og systkinafrádráttur eru kostnaðarmiklar, og tí er væl hugsandi, at fleiri pengar skulu setast av á fíggjarlógini, um slíkar skipanir skulu setast í verk. Hesum er landsstýrismaðurin fullgreiðir yvir.

– Fíggjarorkan er ikki í løtuni til at seta hesar skipanir í verk, og tí eri eg noyddur at raðfesta eldraøkið, sinnisveik, minnisveik fremst, og so mugu nýggju skipanirnar koma í aðru røð. Kortini má eg sláa fast, at tað er ein greiður langtíðarmálsetningur hjá mær at seta bústaðartrygging og familjuveiting í verk, men í løtuni er also ikki fíggjarorka til skipanirnar, vísir Hans Pauli Strøm á.



*Teir tríggir f.v: Fróði Jacobsen, Jóhann Lutzen og Rókur J. Jakobsen hava kannað støðuna hjá einligum mammum í Havn*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Symfoniorkestrið spælir Beethoven

**Benny Wilkinson er dirigentur, og ouverturan til Egmont, klaverkonsert nr. 1 og 5. symfoni, Lagnusymfoniin, eru á skránni, tá Føroya Symfoniorkestur fer at spæla Beethoven í norðurlandahúsinum tann 31. oktober**

SYMFONIKONSERT
*tíðindaskriv*

Egmont-ouverturan er inspirerað av dramatiska sjónleikinum hjá Wolfgang Goethe um frælsisstríð Niðurlendinga móti sponsku kúganini, sum tyranniski hertogin av Alba stendur fyri. Frælsi og frælsiskravið vóru nøkur av teimum viðurskiftum, sum hugtóku Beethoven. Tónleikurin er eyðkendur av hesum stríði, og verða tey lýst í teimum motivum, sum Beethoven nýtir í verkinum.

### Klaverkonsert nr. 1 í c-dur

Hóast henda konsertin hevur nr. 1, so er hon komponerað seinni enn konsert nr. 2. Men av tí at hon var tann fyrra at verða útgivin, so hevur hon fingið fyrra talið. Verkið stavar frá 1797, og er Beethoven tá 27 ára gamal og merkist í hesum verki nakað ungdommiligt og frískligt, einki av tí stórbæra og máttmikla, sum kennist í hansara seinnu verkum. Men verkið er hugtakandi og avbjóðandi bæði fyri solist og orkestur. Solistur til klaverkonsertina er Johannes Andreasen.

### Symfoni nr. 5 í c-moll "Lagnusymfoniin"

Hetta er helst kendasta og mest spælda symfoniin í heiminum. Orsøkin er uttan iva tað, sum Beethoven hevur sagt um tær fyrstu taktirnar í hesum verki "So klopft das Schicksal an die Tür!" ("soleiðis bankar lagnan á hurðina") og hevur hetta úttalilsi fingið tankarnar hjá áhoyrarum at reika. Verkið verður tí vanliga fatað sum ein lýsing av stríðið menniskjans móti síni lagnu. Fortreytirnar fyri hesi hugsan er eydnuleysa lagna Beethovens, tann vaksandi deyvleikin, sum fór at gera alt meira um seg, meðan hann var í holt við hetta verkið.

Tað ber til at meta teir fýra satsirnar sum byrjandi við eini vreiði sum linkar í tí róliga og meira bjartskygda øðrum satsi, í triðja ivi og svartskygni til fagnaðarrómin í fjórða satsi.

# Føroysk gudstænasta í London

Sunnudagin, 5. september kl. 16.00, verður føroysk gudstænasta í donsku kirkjuni í London.

Umframt at kirkjugongd er eín náttúrligur partur av tilveruni hjá nógvum føroyingum, so er hetta eisini eitt frálíkt høvi hjá »nýggjum« føroyingum í London at koma í samband við aðrar føroyingar.

Sagt verður, at tað ikki eru stórvegis trupulleikar at koma til Kirkjuna, sum liggur á St Katharine's Prcinct við Regents Park. Undirgrundsstøðir eru nærhendis, og skjótt er at ganga frá støðunum, Camden Town, Gr. Porltland Street og Regents Park.

Eftir gudstænastuna ber eisini til at keypa sær ein døgurðabita, og er kostnaðurin fyri hetta £ 5,50.

**-jm**